UTTAN ÚR HEIMI

# USA gav skeivar upplýsingar

**Ein av ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak sigur, at amerikansku myndugleikarnir góvu bæði umheiminum og vápnaeftirlitsmonnunum skeivar upplýsingar.**

KRÍGSHÓTTAN
*Árni Joensen:*

-Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, segði ikki sannleikan, tá hann kunnaði ST-trygdarráðið um viðurskiftini í Irak.

Tað sigur norðmaðurin Jørn Siljeholm, sum var ein av ST-vápnaeftirlitsmonnunum í Irak. Hann sigur við Dagbladet, at tað, sum Colin Powell segði um iraksk hópoyðingarvápn, var misvísandi.

-Vit hava fingið nógvar ófullfíggjaðar og vánaligar upplýsingar frá amerikanarunum, og tað ávirkaði samstarvið. Nógv av tí, sum amerikanararnir søgdu um hópoyðingarvápn í Irak, vísti seg at vera beinleiðis ósatt, sigur Jørn Siljeholm. Spurdur, um hann heldur, at amerikanararnir beinleiðis lugu fyri vápnaeftirlitsmonnunum, svarar Jørn Siljeholm, at lygn er eitt sterkt orð at nýta, men upplýsingarnar, sum Colin Powell gav trygdarráðnum um kjarnorkuverkætlanirnar hjá irakum, vóru beinleiðis ósannar, sigur hann.

Sjálvur heldur norski vápnaeftirlitsmaðurin, at krígsavbjóðingin hjá George W. Bush var eitt slag í andlitið á vápnaeftirlitsmonnunum, og hann heldur, at grundarlagið undir amerikansku avgerðini um at leypa á er veikt. Hann ivast í, at amerikanararnir fara at finna nøkur hópoyðingarvápn í Irak. Finna teir okkurt, er talan um so smáar nøgdir, at tað er eingin hernaðarlig hóttan, sigur Jørn Siljeholm, sum fór úr Bagdad fyri einari viku síðani eftir at hava verið í Irak í tríggjar mánaðir.

# Leypa á kortini

**USA fer at leypa á Irak, sjálvt um Saddam Hussein fer av landinum.**

Amerikanarar fara at gera innrás í Irak, sjálvt um irakski forsetin, Saddam Hussein, ger eftir kravinum hjá George W. Bush, forseta um at fara úr Irak innan klokkan eitt í nátt. Tað var annars treytin hjá Bush, tá hann boðaði frá, at fara Saddam Hussein og synir hansara ikki úr Irak innan klokkan eitt í nátt, fer USA at leypa á landið.

Men amerikanarar fara at leypa á kortini. Tað segði talsmaðurin hjá Bush, Ari Fleischer, í gjár.

Samstundis boðaði Colin Powell, uttanríkisráðharri frá, at hann ætlar sær ikki á fundin hjá ST-trygdarráðnum seinni í dag, sum týski uttanríkisráðharrin, Joschka Fischer, hevur tikið stig til.

- Eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til at fara á fundin, og eg vænti, at okkara ST-sendiharri, John Negroponte, fer at taka sær av okkara áhugamálum, segði Colin Powell.

# 45 lond styðja USA

**30 lond hava sambært amerikanska uttanríkisráðnum alment boðað frá, at tey taka undir við álopinum á Irak og lata amerikanarunum ymsan stuðul. 15 lond hava fyribils biðið um at vera ónevnd.**

KRÍGSHÓTTAN
*Árni Joensen*



*Hesir amerikanararnir á herstøðini í Kuwait sita bert og bíða eftir, at teir fáa boð um at trýsta á knøttarnar á teldunum. So byrjar álopið*

30 av teimum 45 londunum hava sambært Colin Powell, uttanríkisráðharra boðið sær til at hjálpa amerikanska hervaldinum á ymsan hátt. Eitt nú hava summi lond játtað amerikanskum stríðsflogførum at flúgva í teirra luftrúmi, onnur hava játtað hjálp til flutning, og uppaftur onnur hava játtað at senda herfólk ella útgerð til økið við Persaflógvan.

Hini 15 londini, sum hava játtað at stuðla USA í álopinum, hava biðið um at vera ónevnd fyribils. Hvørji tey eru, verður almannakunngjørt, tá tíðin er búgvin til tess, sigur Colin Powell.

Tey 30 londini, sum sambært Powell stuðla álopinum beinleiðis ella óbeinleiðis, eru Afghanistan, Albania, Aserbajdjan, Bretland, Bulgaria, Colombia, Danmark, El Salvador, Eritrea, Etiopia, Filipsoyggjarnar, Georgia, Holland, Italia, Japan, Kekkia, Letland, Litava, Makedonia, Nicaragua, Póland, Rumenia, Slovakia, Suðurkorea, Turkaland, Ungarn og Usbekistan.

Frakland hevur verið harðasta mótstøðulandið ímóti einum álopi á Irak, men franski sendiharrin í Washington, Jean-David Levitte, segði við sjónvarpsstøðina CNN í gjár, at at Frakland fer at taka undir við álopi á Irak, um so er, at Saddam Hussein ger av at nýta evnafrøðilig ella lívfrøðilig vápn.

Levitte var franskur ST-sendiharri, til stjórnin í París gjørdi av at flyta hann úr New York til Washington í fjør. Hann verður roknaður sum ein, ið hevur stóra ávirkan á franskan uttanríkispolitikk.

# Fogh oystur undir í máling

**Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri noyddist fyrradagin at sanna, at allir danir eru ikki líka fegnir um avgerðina hjá stjórnini at senda eitt herskip og ein kavbát til Persaflógvan at stuðla amerikanska álopinum á Irak.**

KRÍGSMÓTSTØÐA
*Árni Joensen:*



*Anders Fogh Rasmussen kvikar sær burtur, eftir at tveir ungir menn høvdu sprænt reyða máling á hann og Per Stig Møller, uttanríkisráðharra*

Seinnapartin týsdagin kunnaðu Anders Fogh Rasmussen og Per Stig Møller, uttanríkisráðharri uttanríkispolitisku nevndina hjá Fólkatinginum um avgerðina hjá stjórnini. Teir vóru júst komnir av fundinum, tá tveir ungir menn troðkaðu seg fram at teimum og sprændu reyða máling eftir teimum. Serliga forsætisráðharrin fekk nógva máling oman yvir seg og kvikaði sær inn á skrivstovu sína. Uttanríkisráðharrin var eitt sindur hepnari.

Teir báðir ungu menninir vórðu alt fyri eitt tiknir og koyrdir á eina løgreglustøð. Talsmenn hjá bæði samgongu og andstøðu fordømdu tilburðin, og trygdarleiðarin á Christiansborg segði, at í framtíðini verður betur ansað eftir, hvør sleppur fram at politikarunum.

Felagsskapurin "Globalar røtur" skipaði fyri atgerðini ímóti teimum báðum ráðharrunum, og felagsskapurin boðaði seinni frá, at hann fer at halda fram við tiltøkum til tess at mótmæla, at Danmark stuðlar álopinum á Irak.



# Saddam kann finna upp á alt



**Irakski leiðarin, Saddam Hussein, kann finna upp á alt, verður hann kroystur upp í ein krók, sigur ein fyrrverandi irakskur embætismaður.**

KRÍGSHÓTTAN
*Árni Joensen*

George W. Bush, forseti kravdi týsnáttina, at Saddam Hussein og synir hansara skuldu fara úr Irak. Dagin eftir boðaði Bagdad frá, at hvørki Saddam ella nakar av synum hansara fóru at gera eftir amerikansku kravboðunum.

Tvørturímóti ávaraði elsti sonur forsetans, Uday Hussaein, amerikanska forsetan:

- Konur og møður hjá teimum amerikansku hermonnunum fara ikki at gráta við tárum, men við blóði. Teir skulu ikki kenna seg tryggar, hvørki í Irak ella aðrastaðni, segði tann 39 ára gamli Uday Hussein.

Sjálvur var Saddam Hussein at síggja í hermannabúna týsdagin, og tað er sjáldan, at hann gongur í tí búnanum, men ivaleyst var hetta fyri at vísa irakska fólkinum, at eisini forsetin er búgvin til bardaga at verja landið.

Samstundis royndu amerikanarar at finna útav, um irakski leiðarin ætlar sær at nýta evnafrøðilig og lívfrøðilig vápn ímóti amerikansku og bretsku hermonnunum, men eingin veit, hvat hann hevur í hyggju.

- Hann hevur eini sjáldsom evni til at fjala sínar tankar og sínar ætlanir. Tað er kanska hansara størsti eginleiki. Meg minnist, at Uday einaferð segði: "Høgri skjúrtulummi hjá faðiri mínum veit ikki, hvat er í vinstra lumma", sigur Hamad al-Jubouri, sum fyrr var limur í iraksku leiðsluni, men sum nú býr í London.

Alt bendir á, at Saddam Hussein ætlar at fjala seg einastaðni millum tey fimm milliónir fólkini í Bagdad - ikki á einari herstøð ella í einari av borgum sínum, tí har fara amerikanarar at bumba. Nei, hann fer heldur at fjala seg á einum staði, sum amerikanararnir ikki tora at bumba t.v.s. á einum sjúkrahúsi, í einum skúla ella í einum vanligum húsum.

Semja er um, at Saddam Hussein er bangin. Ikki bara fyri krígnum, tí hann hevur verið bangin alt lívið. Hann lítur ikki á nakran uttan seg sjálvan. Tí veit eingin, hvar hann svevur um næturnar, tí eingin skal vita, hvar hann er. Ein av hansara fyrrverandi heryvirmonnum hevur greitt frá, at forsetin javnan fjalir seg á herstøðum undir jørð. Tey einastu, sum vita, hvar hann er, eru hansara persónligu lívverjar, sum eisini eru næstu skyldmenn hansara.

Saddam Hussein ber ikki bitan í munnin, fyrr enn alt er røntgenkannað og kannað á annan hátt. Hann er bangin fyri, at onkur hevur eitrað matin. Tí veit eingin, nær og hvar hann ætlar sær at eta.

## Avrættaði 66 felagar

Seinastu mongu árini hevur hann beint fyri øllum, sum kundu hugsast at vilja honum til lívs ella at gera uppreistur ímóti honum. Ein heilsumálaráðharri, sum einaferð mælti Saddam Hussein til at leggja frá sær av heilsuávum, varð skotin alt fyri eitt. Saddam skjeyt hann sjálvur.

Á einum fundi, sum varð hildin, stutt eftir at Saddam hevði tikið við valdinum í Irak í 1979, skuldsetti hann 66 av sínum feløgum fyri at hava eggjað til eina samansvørjing ímóti sær. Allir 66 vórðu skotnir, og Saddam gav boð um at taka avrættingarnar upp á sjónband, so hann kundi vísa øðrum, hvørja lagnu teir fingu, sum settu seg upp ímóti forsetanum.

Longu áðrenn hann tók valdið, droymdi Saddam Hussein um at gera Irak til tað mest nútímans og sterkasta landið í tí arabiska heiminum, og júst strembanin eftir hesum gjørdi hann til tann mest harðrenda leiðaran. Lhidhir Hamaz, sum eitt tíðarskeið stóð á odda fyri iraksku kjarnorkuverkætlanini, hevur sagt, at Saddam Hussein ætlaði at gera seg til leiðara yvir øllum økinum í Miðeystri.

- Tað eru hvørki politiskar hugsjónir ella islam, sum draga hann. Pengar leggur hann heldur einki í. Men hann vil vera kendur, og hann vil, at fólk skulu hava virðing fyri honum og líða boð hansara, sigur tíðindamaðurin Mark Bowden, sum í mong ár hevur kannað framferðina hjá irakska leiðaranum.

Kanska er tað júst tí, at hann sýtir fyri at líða boð frá George W. Bush? Tí hann ætlar sær at koma í søgubøkurnar sum maðurin, ið tordi at seta seg upp ímóti amerikanska forsetanum.

## Stalin og Churchill

Tey, sum kenna Saddam Hussein, siga, at hansara stóru fyrimyndir eru Josef Stalin og Winston Churshill. Tveir menn, sum veruliga hvødu vald.

Con Coughlin, sum hevur skrivað eina bók um Saddam Hussein, sigur, at tann einasti munur á útreinsingunum hjá Stalin og Saddam er, at í Irak vóru ongar arbeiðslegur. Tí offur Saddams høvdu ongan møguleika at yvirliva.

Tað sigst, at Saddam Hussein fekk sína fyrstu hugsjónarligu ávirkan av einum farbróðuri, sum var nazistur. Tað ljóðar eisini, at Saddam útinti sítt fyrsta "bragd" sum nýggjur limur í Baath-flokkinum, tá hann beindi fyri einum kommunistaleiðara í heimbýnum Tikrit.

Higartil er irakski leiðarin sloppin livandi burtur úr øllum kreppum. Sum smádrongur misti hann pápan, fosturpápin bukaði hann javnan, og í skúlanum varð hann illa happaður. Men Saddam dugdi at verja seg. Hann hevði eina jarnstong við sær í skúla. Seinastu tíðina hevur hann sagt, at irakar eru til reiðar at verja seg við stavi og steini.

Men at nýta somu verjuvápn ímóti teirri nútímans hernaðarmaskinuni hjá George W. Bush, sum hann nýtti ímóti happarunum í al-Ouja, munar neyvan.